## Gongur einki hjá AC Milan

Tað hevur ikki gingið, sum tað plagar at ganga hjá AC Milan í italsku fótbóltskappingini í ár. Um vikuskiftið spældi AC Milan á heimavølli ímóti Roma, og Milan tapti dystin 1-0. AC Milan hevur bert fingið 10 stig í fyrstu 9 dystunum í italsku Seriu A, og tað er ikki nóg mikið til at gera seg galdandi í toppinum í deildini, har Milan plagar at halda til.




## Einki stuttligt at vinna

Napoli vann um vikuskiftið 3-1 á Juventus í italsku Seriu A, men dómarin gav Napoli eina hjálpandi hond. Eftir at støðan var blivin 1-1, bríkslaði dómarin tvær ferðir fyri brotssparki, hóast talan als ikki var um brotsspark. - Okkara spælara framdu eitt stórt avrik, men tað er keðiligt at vinna á slíkum grundarlagi. Vit kunnu ikki gera nakað við tað, og rættast hevði verið at brúkt sjónvarpsupptøkur í avgerandi støðum fyri at fáa rættari døming , segði De Laurentiis, forseti í Napoli eftir sigurin.

## Hol skulu fyllast

Tað tykist, sum skulu nøkur týðandi hol fyllast, um B36 aftur skal gera seg galdandi í føroyska fótbóltsoddinum í 2008.

Tað er greitt, at Jákup Mikkelsen ikki heldur fram sum málverji hjá B36, nú hann er liðugur við læraraútbúgvingina og er fluttur aftur til Klaksvíkar.

Hartil er eisini ivasamt, um Fróði Benjaminsen fer at halda fram í felagnum. Formaðurin í B68 hevur alment váttað, at teir fegnir vilja hava Fróða aftur til heimbygdina, og tað ljóðar eisini, at NSÍ, EB/Streymur og HB øll liggja fram við í royndunum at fáa spælaran úr B36.

- Eg havi einki sum helst gjørt av. Eg veit væl, at gitingarnar eru nógvar, men teimum má eg bara flenna at. Fyrst og fremst havi eg savnað tankarnar um at spæla fyri B36, og eg havi alla tíðina sagt, at eg onga avgerð taki, fyrr enn kappingin er liðug, sigur Fróði Benjaminsen.

Umframt teir báðar føroysku landsliðsspælararnar er eisini sera ivasamt, um Sylla heldur fram í felagnum.

-mørk

B36-HB 0-2 (0-1):

# Veitslan var uttanfyri

*B36*

*HB*

**Viðhaldsfólkini royndu at gera grannauppgerðina í Havn eins serliga, sum tær vanliga eru. Men á vøllinum komu ferðin og intensiteturin sjáldan í hæddina**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Hóast hann stríddist, so eydnaðist ikki hjá Amed Davy Sylla at økja um máltalið. Men hann endaði tó árið sum besti málskjúttin í Formula-deildini*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Hóast B36 hevði silvurmerkini at stríðast fyri, so tóktist hetta ikki vera nóg mikið, tá teir leygardagin fóru á vøllin til seinasta dystin hetta kappingarárið. Grannauppgerðin í høvuðsstaðnum plagar annars at vera nakað, sum fær spælarar á báðum liðum upp í gear, men heldur ikki hjá HB sást nakað til, at hesin dysturin skuldi verið so serligur fram um aðrar.

Orsøkin var sum so eisini einføld. Við gullinum, sum NSÍ vissaði sær seks dagar undan hesum, var gassið at kalla farið av ballónini. HB kundi so ikki vika seg frá sínum fjórða plássi, og júst hendan dagin mundu teir hvítu vera hampuliga líkasælir, um talan gjørdist um silvur- ella bronsumerki.

Og so fekk tað valla verið øðrvísi. Dysturin gekk fyri tað nógva fyri seg í einum róligum tempo, har nærdystirnir vóru fáir og intensiteturin lítil. Til tíðir megnaðu partarnir at fáa samanhang í spælið eina løtu, men veruligt bit var sjáldan í. Undantakið var kanska Sylla, sum tóktist ógvuliga uppsettur upp á at staðfesta sín status sum toppskjútti í Formula-deildini, men hann varð alla tíðina væl ansaður av Vagni Mohr Mortensen, ið mundi vera frægasti HB'arin á vølli.

Málmøguleikarnir vóru heldur ikki teir heilt nógvu. Og ógvuliga sigandi, so var talan um eitt málmansmistak eftir deyðbólt, sum bar leiðslumálið við sær. Hví Jákup Mikkelsen valdi at hava múr, tá HB fekk frísparк einar 30 metrar úti, er ilt at siga. Úrslitið var í øllum førum, at Rasmus Nolsøe langaði til, og tá bólturin so knekkaði á veg inneftir, samstundis sum Jákup sá hann rættiliga seint, kundi hart skjótandi tvøramaðurin enn einaferð fegnast um eitt frísparksmál.

Hjá B36 gekst illa at skapa nakað. Eftir steðgin varð Fróði Benjaminsen fluttur á miðvøllin, og tvær ferðir var um reppið, at hann fekk javnvág í, meðan Oddmar Færø eisini hevði ein stútara, sum fór beint á HB-málverjan.

Hin vegin royndi HB at dúva upp á kontra, og tá tveir minuttir vóru eftir at spæla, kundu teir við vakrasta álopinum í dystinum seta punktum fyri Formula-fótbóltinum í ár. Milan Kuljic og Andrew av Fløtum broderaðu seg niðan eftir vøllinum, og dygst undir málinum kundi Rógvi Jacobsen staðfesta sína støðu sum HB-toppskjútti.

### Lakur endi

Fyri HB mundi sigurin kennast sum ein troyst, nú talan ikki gjørdist um heiðursmerki í ár. Hóast alt, so gevur ein sigur á grannunum rættin til at arga komandi vetrarhálvuna, meðan felagið aftur ger seg til at seta kós móti oddinum.

Hjá B36 var tapið mest sum ein staðfesting av, at endaspurturin ikki var nóg góður, tá talan av álvara gjørdist um kapprenning við NSÍ. Seinastu tríggjar dystirnar varð einki stig vunnið, og seinasta triðingin megnaðu teir bert at vinna 12 av 27 møguligum stigum.